# Heimaflotin gav Jacobi fullan stuðul



*Marner Lisberg er formaður í Felagnum Lemmatrolarar. - Tað var ikki gamalt í Føroyum at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, sigur Marner Lisberg, nú alsamt fleiri røddir eru frammi um at selja makrelin, áðrenn hann er fiskaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**MAKRELUR - Tá landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard, í fjør mest sum stóð einsamallur í øllum ódnarveðrinum í spurninginum um makrelin, gav heimaflotin honum fullan stuðul, sigur Felagið Lemmatrolarar**

Vilmund Jacobsen

Felagið Lemmatrolarar, har Marner Lisberg er formaður, ger nú í skrivi til miðlarnar vart við síni sjónarmið í spurninginum um nógv umrødda makrelin.

Felagið vísir á, at um hesa tíðina í fjør var landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í sonnum ódnarveðri.

– Orsøkin var, at hann vildi ikki gera avtalu við ES og Noreg um makrelbýtið landanna millum, tí hann metti, at Føroyar eiga ein størri part av makrelinum enn tey 4,7%, sum avtalað hevði verið um framman undan.

Felagið sigur, at harðast leikaði á, tá teir, sum gjøgnum árini hava fiskað makrel, eins og stórir partar av politisku skipanini, fóru saman um at krevja, at landsstýrismaðurin gjørdi avtalu við teimum 4,7% sum grundarlagi.

– Landsstýrismaðurin stóð mest sum einsamallur í hesum týdningarmikla máli, sigur felagið.




*Felagið Lemmatrolarar heldur, at skulu vit varðveita ein fjølbroyttan fiskiflota í Føroyum, heimahoyrandi í ymiskum økjum í landinum, er neyðugt at býta makrelin soleiðis, at flest møguligir hava møguleika at verða við*

### Heimafloti stuðlaði

Røddir í heimaflotanum hava í fleiri ár gjørt vart við, at føroyingar fáa alt ov lítlan part av makrelinum, serliga tí, at nógvur makrelur hevur verið at sæð í føroyskum sjógvi um sumrarnar.

– Eisini hevur verið ført fram, at tá makrelurin kemur í føroyskan sjógv, kann eingin ivi vera um, at hann kemur henda vegin eftir føði, eitt nú eftir toska,- hýsu, og upsayngli,- ella tí, sum heimaflotin skal fiska um nøkur ár.

Felagið vísir á, at hetta er ein orsøkin til, at heimaflotin gav landsstýrismanninum sín fulla stuðul, tá hann í fjør ásetti Føroyum eina eginkvotu á 85.000 tons.

- Hetta gjørdu vit, hóast ES og Noreg hóttu við bál og brandi, eitt nú við at forða fyri innflutningi av fiski til ES. Hetta kundi rakt heimaflotan og flakavinnuna meint, men kortini var semja um ikki at bakka longur, serliga við atliti til veruleikan um, at makrelurin fer eftir tí, sum hesin floti og vinnan skal liva av seinni.

> **Vit duga at síggja, at makrelur eisini kann gerast eitt gott ískoyti hjá lemmatrolarum**
>
> MARNER LISBERG

### Stór virðing

Í skrivinum leggja teir, sum umboða lemmatrolararnar, aftrat, at heimaflotin hevur stóra virðing fyri teimum, sum hava gjørt stórar íløgur í skip við tí endamáli at fiska makrel og annan pelagiskan fisk.

– Tí halda vit tað eisini vera eina sjálvfylgju, at hesir fáa sín rímiliga part av makrelinum.

Í fjør var pelagiski flotin nøgdur við at fáa 4,7% av samlaðu makrelkvotuni. Hetta hevði blivið til eina kvotu til Føroyar á eini 30.000 tons.

Felagið Lemmatrolarar vísir á, at í ár er vent í holuni, tí nú fær landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum stórt sæð stuðul frá allari vinnuni, og politiska skipanin er farin at tosa um, hvør nú skal eiga rættin til hetta tilfeingið.

– Vit í Felagnum Lemmatrolarar fingu í fjør høvi til at gera eina roynd at partrola eftir makreli í føroyskum sjógvi, og hóast tað vóru nógvir, sum vildu verða við, at hetta fór ikki at rigga, eydnaðist royndin væl. Vit duga at síggja, at makrelur eisini kann gerast eitt gott ískoyti hjá lemmatrolarum.

Felagið leggur aftrat, at um støðið verður tikið í teimum 4,7%, sum ætlanin var at góðtaka frá ES og Norra í fjør, høvdu vit tosað um ein mun á meiri enn 100.000 tons, um føroyska kvotan í ár verður ásett til 150.000 tons.

### Fjølbroyttur floti

Felagið Lemmatrolarar heldur, at skulu vit varðveita ein fjølbroyttan fiskiflota í Føroyum, heimahoyrandi í ymiskum økjum í landinum, er neyðugt at býta soleiðis, at flest møguligir hava møguleika at verða við.

– Tað var ikki gamalt í Føroyum at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, og nú fólk tosa um at selja makrelin, áðrenn hann er fiskaður. Hetta halda vit vera lítið takksamt fyri tað, sum flestu føroyingar halda vera eina Guðs gávu, sigur Felagið Lemmatrolarar í skrivinum.

vilmund@sosialurin.fo